# Edvardskur og lassenskur nýhálmur



*ALDARINNAR GONGUTÚRUR: Edvard Nyholm Debess og Teitur Lassen framføra um eina viku Aldarinnar Gongutúr. Teir báðir tónleikararnir hava eina ætlan, ið m.a. fevnir um Tey av Kamarinum og Simma. Teir hava malið alt í kvørnini hjá Edvardi, teir hava edvardskað og lassenskað tónleikin og burturúr er komin nýhálmur. Eitt verk, ið verður frumframført komandi vikuskiftið*

*Komandi vikuskiftið framføra Edvard og Teitur Aldarinnar Gongutúr. Eingin plakat er gjørd, men forvitnisligt postkort, fyri at leggja dent á, at her er nakað øðrvísi*

DAGFINN OLSEN

Komandi vikuskiftið verður forvitnislig tónleikaætlan framførd á Meiarínum. Júst hvat hon snýr seg um, vilja upphavsmenninir ikki siga, men tó er greitt, at tað er nakað minniligt og at tað ber við Tey av Kamarinum, Simma, Birna Dam og so framvegis.

Edvard Nyholm Debess vendi sær til Tórshavnar Býráð, fyri at vita um áhugi var fyri at gera eitthvørt í samband við ár 2000, ið hevði við Havnina at gera og var fyri Havnina. Áhugin var har og Aldarinnar Gongutúrur er eitt verk, ið er úrslit av hesum. Undirheitið er Ein minnilig tónleikamynd.

**Smáttan**

Sum Edvard tekur til, so segði William Heinesen, at Havnin er heimsins nalvi. Og hetta sigur Edvard, meðan hann væl nøgdur situr í sínum úthúsi í aldingarðinum í Tvørgøtu. Her her tónleikaliga verkstaðið hjá Edvardi. Eins og William hevði sína kreativu smáttu, hevur Edvard sína.

Og tað er júst í hesi smáttuni, at vit prátað við Teit Lassen og Edvard Nyholm Debess um forvitnisligu ætlan teirra.

**Nýhálmur**

Teitur og Edvard funnu saman í samstarv fyri mongum árum síðani við ein jazzfestival. Og síðani aftur við 100 ára føðingardag William Heinesens.

Tá rann saman aftur teirra millum og Teitur kom uppí ætlanir Edvards, tá hann greiddi frá um sín treytaleysa kærleika fyri gomlum tónleki, Teimum av Kamarinum, Simma og Birna Dam. Um at finna út av hesum, sum fyri stóran part hevur við minnir at gera. Um at geva hesum lív, so eisini tey yngru finna út av hesum og koma at kenna hetta. Hetta, sum fyri stóran part livir í minninum hjá mongum.

Í smáttuni fær prátið rættiligt flog, meðan vit sita millum kontrabassar, elbassar, teldu og fløgur. Og orðini og frágreiðingarnar eru flákrandi og veingjaðar, men tó ikki ov avdúkandi, tí tað vilja teir báðir ikki.

Alt hetta, hugskotini, rann so saman í hægri eind. Varð edvardskað, lassenskað, koyrt í Edvardsa kvørn og kom út aftur sum nýhálmur, er endin á samanumtøkuni av upprunanum og arbeiðsgongdini til Aldarinnar Gongutúr – Ein minnilig tónleikamynd.

Edvard hevði hugskotið um Aldarinnar Gongutúr. Lyklaorð í upprunaætlanini hjá teimum báðum eru øldir, minnir og uppruni.

Ein kann so freistast at trúgva, at tað er tí, at Teitur og Edvard kendu seg bundnar at gera eitthvørt fyri gamla tónleikin, Sum eina skyldu, men so er ikki. Tað er bert spennadi og stuttligt, siga teir báðir.

**Upprunagesturin**

Edvard og Teitur leggja dent á, at konseptið, ella ætlanin, er sera greið og hevur stóran týdning. Teir hava nýtt tíð til at finna júst røttu fólkini. Ikki nógv fólk, men tey røttu. Og hóast Edvard og Teitur vita hvat teir vilja, so sleppa hesi fólk at gera sum tey vilja, so at skilja, at hevur onkur hug at leika okkurt ávíst, ið ger stykkið betri og er neyðugt hjá tí einstaka, so er frælsi til tess.

– Tónleikararnir hava fríar teymar, so tónleikurin fær lív, siga Edvard og Teitur.

Tónleikararnir eru valdir út, tí teir verða mettir at hóska til ætlanina, og sum Edvard skemtandi sigur, so eru teir havnarmenn!

Tey luttakandi í Aldarinnar Gongutúri eru guitarleikarin Leivur Thomsen, Trygvi í Brekkunum, trummur, sjónleikarin Páll Danielsen, Teitur og Edvard og so Upprunagesturin.

Henda seinasta vilja teir ikki avdúka nógv um, men teir leggja dent á, at hann er grundleggjandi og av alstórum týdningi fyri verkið.

**Mála við tónum**

At tað svingar millum teir báðar tónleikararnar í smáttuni í Tvørgøtu, er ikki at taka seg aftur í. Spyr ein, hví verkið hevur heitið tónleikamynd, so svara teir við snildisligum orðavavstri, at ikki er talan um sjónleik. Kanska um at ímynda sær nakað. Kanska um mynd. Ja, eina minni tónleikamynd, eina minniliga tónleikamynd… (og her gavst tygara útsendi at skriva sær meira í blokkin).

Men rámandi hugleiða teir, at um ein mynd nú er svørt og hvít, so er bert at seta litir á við tónleiki.

Og ætlanin er sera greið og jarðbundin. Ikki tey stóru armsveiggini og hjálpitólini. Tað er hetta við at skapa eitt umhvørvi, fáa fólk at ímynda sær nakað. Skapa stemning , huglag, millum áhoyrarar. Talan er um at skapa eit intimt upplivilsi, eru Edvard og Teitur samdir um.

**Postkort**

Eingin plakat er gjørd í samband við tiltakið, men eitt forvitnisligt postkort.

– Hetta er eisini fyri at senda út tekin um, at her er nakað øðrvísi. Ikki bert ein konsert, har Edvard og Teitur leika, siga teir báðir.

Framførslurnar eru fyribils tvær í tali og tær verða tann 8. og 9. juli á Meiarínum í Havn. Leygardagin klokkan 21.30 og sunnudagin klokkan 20.00.

Atgongumerkini til verkið Aldarinnar Gongutúrur, sum Edvard stendur skrivaður fyri at hava skrivað, sett saman og eiga hugskot til, fáast á Kunningarstovuni í Havn og tey kosta 75 krónur.



*» Um ein mynd nú er svørt og hvít, so er bert at seta litir á við tónleiki «*

***Myndviðgerð: Álvur Haraldsen***

*» Sum Edvard tekur til, so segði William Heinesen, at Havnin er heimsins nalvi. Og hetta sigur Edvard, meðan hann væl nøgdur situr í sínum úthúsi í aldingarðinum í Tvørgøtu. Her her tónleikaliga verkstaðið hjá Edvardi. Eins og William hevði sína kreativu smáttu, hevur Edvard sína «*



*Teitur Lassen og Edvard Nyholm Debess uttan fyri smáttuna í aldingarðinum hjá Edvardi. Eins og William Heinesen, hevur Edvard sína kreativu smáttu, har Aldarinnar Gongutúrur hevur sín uppruna*

***Mynd: Jens Kr. Vang***






SANSIR TEL 355355

Kaupthing gevur tær møguleikan at gerast virkin partur av altjóða virðisbrævamarknaðinum. Við íløgum í parta- ella lánsbrøv hevur tú møguleikan at fáa ein hægri vinning enn við vanligum uppsparingum. Tosa við okkum, og vit finna í felag eina loysn, ið hóskar til júst tín tørv.

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com